LM-097/2020

Fylgiskjal 7

HAGSTOVA FØROYA

Argir, 15-02-2021

Hoyringssvar til

Lógaruppskot um broytingar í lóg um Landsbanka Føroya og lóg um Búskaparráð

Landsbanki Føroya saman við Føroya váðaráði og Búskaparráðnum eru sum eftirlits- og greiningarstovnar ivaleyst størstu brúkarar av hagtølum hjá Hagstovu Føroya til eitt nú búskaparfrágreiðingar, konjunktur- og váðagreiningar. Hagstova Føroya hevur tí tætt samstarv og gott innlit í uppgávurnar hjá stovninum og ráðnum.

Hagstova Føroya hevur fingið uppskot til broytingar í løgtingslóg fyri Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð og uppskot til løgtingslóg um Búskaparráð til hoyringar og vil við hesum gera hesar viðmerkingar.

Samanumtøka:

1. Nevndin í Landsbankanum hevur serskildar og krevjandi uppgávur, ið eru so mikið ymiskar frá endamálinum hja Búskaparráðnum, at talan ikki er um samanfall av uppgávum. Harumframt verða eftir ætlan ikki somu fakligu krøv sett til Landsbankanevnd sum til verandi Búskaparráð. Ætlanin at flyta uppgávuna hjá Búskaparráðnum til Landsbankanevndina eigur tí at verða slept.

2. Búskaparráðið eigur framhaldandi at verða skipað við trimum limum sambært somu krøvum til førleikar, ið galdandi lóg um Búskaparráð ásetir. Nøktandi røkt og menning av uppgávum hjá Búskaparráðnum krevur minst 2 ársverk í skrivaratoymi og eigur at staðsetast í fakligum og greinandi umhvørvi. Búskaparráðið kundi tí verið staðsett í Landsbankanum. Mælt verður til, at játtan svarandi til minst 2 ársverk til skrivaratoymið eigur at fylgja við.

3. Telur nevndin í Landsbankanum 3 limir verður grundreglan um demokratiska umboðan, ið er ásett í galdandi lóg við tilmæli frá Setrinum, landsstýrismanni, kommunum, arbeiðsgevarum og fakfeløgum til nevndarlimir, slept. Óansæð tal av nevndarlimum má krav um umboðandi fakligar førleikar í nevndini framvegis galda. Tað er ikki óvanligt, at nevndir ella stýri telja 7 fólk.

4. Ætlaða nýggja ásetingin um val av nevndarlimum í Landsbankanum, og at Landsbankin verður viðgjørdur sum vanligur almennur stovnur við vanligari rakstrarjáttan á fíggjarlógini, linkar um óheftni í mun til verandi skipan. Viðmerkingarnar til uppskot um broytingar í lógini nevna ikki hetta sum eitt av endamálunum. Mælt verður til at varðveita skipanina við val av limum í Landsbankanevndina og at Landsbankin verður fíggjaður eins og galdandi lóg ásetir.

Til 1

Mælt verður frá, at nevndin í Landsbanka Føroya verður Búskaparráð

Nevndin í Landsbanka Føroya hevur í dag sum uppgávu at seta og loysa stjóran úr starvi, at gera reglur fyri virksemi hjá nevnd og stjóra, gera ásetingar fyri, hvussu gjaldføri og skuld landsins skal umsitast og skal annars tryggja, at stovnurin fylgir galdandi reglum fyri almennar stovnar. Umframt at seta karmar fyri virksemið og hava eftirlit við stovninum, er endamálið í stóran mun at stuðla stjóra og starvsfólkum í fakligum spurningum.

Búskaparráðið hevur í áratíggju, og skal eftir ætlan framhaldandi, virka við tí endamáli at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum, og skal geva óhefta búskaparliga ráðgeving og framleiða tvær frágreiðingar um árið. Uppgávan krevur grundleggjandi bestu búskaparfakligu førleikarnar. Harumframt

skulu limir hava eitt sera gott og breitt innlit í flest øll samfelagsviðurskifti. Boðskapurin hjá ráðnum verður borðin til almenningin og politisku skipanina, og er talan um eitt sjónligt og mangan útsett starv í almenna rúminum.

Í galdandi lóg um Búskaparráð er krav um, at limir skulu vera búskaparfrøðingar. Hesir verða valdir av landsstýrisfólki í fíggjarmálum í ráðið eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Endamál og innihald hjá Búskaparráðnum skal ætlandi vera tað sama, men við tað, at Landsbankanevndin eftir ætlan skal verða Búskaparráð, broytist mátin at velja ráðið uppá, umframt at kravið um búskaparfakligu førleikarnar til limirnar ætlandi verður slept. Hetta er ein týðandi broyting, ið ikki verður viðgjørd í viðmerkingunum til lógaruppskotið um Búskaparráð.

Hendan ætlaða broytingin við skipan av Búskaparráð minkar um førleikakravið og sannlíkt eisini um góðsku á almennum búskaparfrágreiðingum og fakligum ráðum til politisku skipanina. Mælt verður frá, at Landsbankanevndin verður Búskaparráð.

Til 2

Mælt verður til at uppraðfesta skrivaratoymið hjá Búskaparráðnum til 2 starvsfólk

Fróðskaparsetur Føroya hevur síðan 2013 røkt skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið, og hevur Búskaparráðið seinastu 7 árini fingið játtað umleið 2,4 mkr. frá Løgtinginum. Av hesi játtan hava 3 ráðslimir fingið árliga samsýning á tilsamans umleið 200 tkr. og hevur Fróðskaparsetrið síðan havt umleið 2,2 mkr. til raðfestingar millum skrivarauppgávu, keyp av uttanhýsis tænastum til Búskaparráðið og annað virksemið innan búskapargransking og -undirvísing á Setrinum.

Fyrstu árini, ið Setrið hevði skrivarauppgávuna um hendi, varð 1,5 ársverk raðfest til skrivaratoymið, men er við tíðini minkað til í dag at vera 1 ársverk. Uppgávan at framleiða tvær konjunkturfrágreiðingar um árið og veita óhefta búskaparfakliga ráðgeving, sum síðan 2014 hevur fingið játtað umleið 2,4 mkr. frá Løgtinginum, er tá samanum kemur niðurraðfest.

Í viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg um Búskaparráð verður sagt, at tær 1,4 mkr. av tilsamans 2,4 mkr., ið Løgtingið síðan 2014 hevur játtað til Búskaparráðið (høvuðskonta 3.15.1.13), og sum Setrið hevur raðfest til gransking og undirvísing, verða játtaðar beinleiðis til Fróðskaparsetrið (høvuðskonta 7.23.6.16). Við hesum má roknast við, at ætlanin er, at Búskaparráðið (høvuðskonta 3.15.1.13) skal hava árliga rakstrarjáttan á fíggjarlógini á 1 mkr.

Hagstova Føroya vil mæla Løgtinginum til at uppraðfesta Búskaparráðið, so árliga játtanin til Búskaparráðið (høvuðskonta 3.15.1.13) á fíggjarlógini røkkur til setan av tveimum búskaparfrøðingum í skrivaratoymið hjá Búskaparráðnum.

Sum nevnt verður í viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg um Búskaparráð, so hava frágreiðingarnar hjá Búskaparráðnum serliga stóran týdning fyri politisku skipanina í samband við fíggjarlógararbeiði. Mett er, at Landsbanki Føroya hevur fakligt umhvørvið, sum hóskar væl saman við endamálinum hjá Búskaparráðnum. Tað er tí skilagott stig at flyta skrivarauppgávuna til Landsbankan.

Til 3

Talið av nevndarlimum í Landsbankanum byggir á demokratiska og fakliga umboðan

At nevndin í Landsbankanum hevur 7 limir stavar frá demokratiskum og fakligum atlitum. Umboðanin er býtt millum land (2 limir), kommunur (1 limur) og partarnar á privata arbeiðsmarknaðinum (2 limir). Harumframt skal Fróðskaparsetur Føroya gera tilmæli til 2 nevndarlimir, soleiðis at faklig umboðan eisini er tryggjað.

Í galdandi lóg um Landsbanka Føroya verða ásett førleikakrøv til Landsbankanevndina. Krav er um, at førleikar innan búskaparfrøði, fígging og kredittmeting eru umboðaðir og at nevndarlimir eisini hava gott innlit í føroyska fíggjargeiran og búskapin. Mælt verður til, at kravið um umboðandi førleikar til hesar uppgávurnar verður varðveitt.

Tað er ikki óvanligt, at nevndir ella stýri telja 7 fólk, m.a. hava stýrini fyri Kringvarp Føroya og stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya 7 limir. Um grundreglan um demokratiska umboðan framhaldandi skal galda, so er ivasamt um talið av nevndarlimum kann lækka. Samstundis er ivasamt um nevndu fakligu førleikakrøvini finnast samlað í trimum persónum.

Til 4
Óheftni hjá eftirlits- og ráðgevandi myndugleikum linkar
Seinasta alheims fíggjarkreppan fyri 12 árum síðan kom óvart á flest øll lond í heiminum og spurningur varð settur, um tær skipanir, ið skuldu virka móti slíkari kreppu, virkaðu eftir endamálinum. Høvuðsniðurstøðan í flest øllum londum var, at verandi eftirlits- og greiningarstovnar skuldu styrkjast og samstarva meiri, umframt at sokallaðir makroprudentiellir myndugleikar, ið skuldu greina og gera vart við systemiskar váðar í fíggjargeira og búskapinum í síni heild, skuldu stovnsetast. Í ES-samanhangi fingu øll limalondini í 2012 boð um at fara undir umskipanir til tess at styrkja skipanina og stovnseta nýggjar makroprudentiellar myndugleikar.

Landsbanki Føroya og Føroya váðaráð eru eftirlits- og ráðgevandi myndugleikar, ið eru skipaðir eftir somu altjóða vegleiðingum, ið onnur lond hava brúkt til stovnsetan av líknandi myndugleikum. Hesir stovnar hava í felag sum yvirskipað endamál at virka fyri, at samfelagið ikki endar í fíggjarkreppu. Í vegleiðingini til øll ES-limalond vísir ESRB á týdningin, at slíkir makroprudentiellir stovnar eru operationelt óheftir frá politiskum organum og fíggjargeiranum, umframt at organisatorisk skipan og fígging ikki skal kunna ávirka arbeiðsumstøðurnar við vanda fyri, at neyðug stig til fyribyrging av fíggjarkreppum verða tikin.

Í lógarfyrireikingararbeiðinum til stovnan av Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð í 2016, varð bygnaður og óheftni hjá hesum báðum myndugleikum viðgjørt við atliti til, hvussu stovnar við somu endamálum og uppgávum í grannalondum og aðrastaðni í Evropa annars eru skipaðir. Í hesum fyrireikingararbeiði varð javnvágin um armslongd millum operationelt og fíggjarligt óheftni funnin og sum ásett er í galdandi lóggávu. Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg fyri Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð hevur tvær broytingar, sum linka um óheftni í mun til galdandi skipan: Fyrra er, at landsstýrismaðurin eftir ætlan skal velja limir í nevndina í Landsbankanum uttan krav um innstilling, og seinna er, at Landsbankin fær støðu á fíggjarlógini sum vanligur almennur stovnur við vanligari rakstrarjáttan.

Í viðmerkingunum verður einki nevnt um endamál við hesum ætlaðu broytingum, eins og eingin faklig viðgerð av hesum ætlaðu broytingum er gjørd. Hagstovan mælir frá, at hesar broytingar verða gjøgnumførdar.

Gilli Wardum, stjóri